# Betur er bøtandi hond enn spillandi tunga

BJØRN KALSØ
løgtingsmaður



Tað harmar meg, at Jákup Mikkelsen tekur grein, eg havi skrivað, sum persónligt briksl móti honum og Fólkaflokkinum. Tí tað hevur ikki verið ætlanin.

Tá eg í aftursvari til grein hjá Jákupi Mikkelsen skrivaði at: »Jákup fer lætt um sannleikan« , varð bert sipað til ein setning í grein Jákup sjálvur hevði skrivað, og sum eg metti gav eina skeiva mynd av tí, sum farið var fram, og tí átti at verið orðaður øðrvísi.

Setningurin, sum er soljóðandi: »Tí hevur fólkaflokkurin mælt til at spara í almennu fyrisitingini, men sambandið segði nei og argumentið var, at hetta fór at krevja uppsagnir« varð tí eisini endurgivin í mínum svari, soleiðis at eingin ivi skuldi vera um, at tað vóru júst hesar orðingar, sum eg metti vóru skeivar. Um Jákup heldur, at ætlan mín var at geva eina mynd av, at hann javnan fer lætt um sannleikan, fer hann skeivur. Tí tað havi eg onga orsøk til at halda.

Hin parturin av grein míni um aðalráð og útreiðsluvøkstur, var staðfesting, sum skuldi geva eina mynd av, at tað til tíðir eru onnur enn Sambandið, ið ikki vilja spara.

# Politiskan brúkaraumboðsmann

DAGFINNUR DANBJØRG



Tað er upp á hægstu tíð, at settur verður ein politiskur brúkaraumboðsmaður, sum kannar samhangin ella kanska rættari vantandi samanhangin ímillum flokkanna stevnuskráir og politiska praksis. Tí eitt er vist, og tað er, at um vit fyristilla okkum hin einstaka flokkin sum eina dós, har stevnuskráin stóð uttaná sum vegleiðing um innihaldið, so hevði brúkaraumboðsmaðurin meldað framleiðararnar fyri falska vørulýsing, og dósirnar høvdu verið tiknar av hillunum og burturbeindar. Tað hevði tá eisini víst seg, at innihaldið í dósunum hevði stórt sæð verið tað sama, óansæð floksnavn og politiska stevnuskrá. Núverandi samgonga eitur ABC, men hennara praksis vísir, at hon í veruleikanum átti at itið AAA. At fólkið finnur seg í tílíkum svindli er bæði óforstáiligt og óforkláriligt.

Hví ikki taka avleiðingarnar av at verða hildin fyri gjøldur og fyri tað turra spott og krevja eina nýggja byrjan við nýggjum flokkum og nýggjum fólki, sum vit vita, hvat standa fyri og eru til at líta á?

# Gjørt arbeiðið til lítar!

EYÐUN MOHR VIDERØ



Fyri stuttum vóru tíðindi borin í útvarpinum, at Tórshavnar kommuna hevði latið gera eina nøgdsemiskanning á ávísum stovnum kommununnar, og har varð staðfest, at arbeiðsúrslitið hjá starvsfólkum við pedagogiskari ábyrgd var nøktandi. Trivnaðurin á stovnunum var góður, og bæði arbeiðsfólk og brúkarar trivust sera væl!

So skuldi alt verið í lagi!!

Men nei. Tíðindamaðurin vendi sær til formannin í pedagogfelagnum, fyri at tosa, og væl rósa limum hansara fyri úrslitið.

Formaðurin kundi vegna limir sínar tí staðfesta, at tey høvdu uppiborið nógv betri løn. Samfelagið skuldi sjálvsagt gjalda meir fyri eina betri tænastu!! Og tí mátti verandi sáttmáli broytast, har tað snýr seg um lønirnar.

Eg siti og bíði eftir, nær tíðindamaðurin spyr nærri, hvat formaðurin heldur um verandi lønarsáttmála. Men haðan kom sjálvandi onki!

Tá pedagogarnir nú skulu fara upp í løn, hóast støðuna í samfelagnum, tí teir gera eitt so gott arbeiði, sum omanfyri nevnda kanning vísir, skal tað meðni skiljast soleiðis, at lønin, ið hesi fáa í løtuni, er fyri eitt vánaligt arbeiði???

Kemur ongastaðni skil á millum gerð og orð?

# Bankaørindi við barnavogni og ballón

JOHAN Í KOLLAFIRÐI



Meðan eg illur og hopleyst roydni at trýsta mín stóra jeep inn á lítlu, smølu gongugøtuna í 1000 ára gamla høvuðsstaði okkara, irriteraðist eg inn á, at allir bankarnir absolut skulu liggja mitt á gongugøtuni. Tí, hvat er ein gongugøta? - Ein gongugøta er eitt stað, har borgararnir kunnu spáka stillisliga aftur og fram í einari roynd, via smalltalk, at 'lada' innaru battaríini upp, áðrenn lagt verður út aftur í jagstranina eftir, uttan grund, at halda ein búskaparbøkstur uppá yvir 12%…

Okey, so tað er ein gongugøta. Hvat er so ein banki?

- Ein banki er eitt stað, har tú skjótt og effektivt, uttan nakað sum helt stríð, robotagtigt kanst flyta pengar av einari konto (hjá tær ella mær) á eina konto (hjá tær ella mær)… Náh, okey, so tað er ein banki. Tvs. Gongugøtur vs. bankar er sum dagur og nátt, hvítt og svart, pluss og minus…

Men í Føroyum eru bankarnir alltíð á gongugøtuni!!?? Og næsta reklamukampagnan verður eitt uppshinað supermodelpar við barnavogni og ballón, sum í góðveðrinum støkka inn til fryntliga og vinarliga bankaráðgevan og upprætta eina 60'ára konto til ófødda barnið. Sera, sera hugnaligt, men komplett órealistiskt og óbrúkiligt; typiskt Føroyar.

Sjálvandi er Føroyar farið á heysin: Hví er bankin í gongugøtuni? Er tað av charmerandi, nostalgiskum orsøkum, íbirtar av einum ynski um at kveikja hugna og tryggleika? Nei!: Tað er tí, at fyri at ONGIN banki skal vera í gongugøtuni, so eru tey dýrastu grundstykkini BEINT HAR. Og hvis tað er NAKAÐ, sum ein banki hevur nokk av, so er tað pengar. So svar:

Bankin er í gongugøtuni, tí at hann IKKI skal vera har.

# Ein samskipað eldrarøkt

RÓSA SAMUELSEN
landsstýriskvinna í almannamálum



Farnu vikurnar hevur sjóneykan av álvara verið sett á ta røkt og tær tænastur, ið vit í Føroyum veita okkara eldru. Ymisk viðurskifti eru viðgjørd í fjølmiðlunum og á politiska pallinum, og seinast spurdi Jenis av Rana, løgtingsmaður, um tey eldru fáa eina virðiliga viðgerð.

Eingin skal ivast í, at mín fatan er, at starvsfólkini í eldrarøktini gera eitt megnar arbeiðið. Tó nemur Jenis við ein sentralan spurning, tá hann í lesarabrævinum finst at manglandi kunning til tey eldru, ið hava tørv á tænastum frá tí almenna.

Jenis ger eina áhugaverda samanbering: Tá vit søkja um barnaansing til lítla barn okkara, so fáa vit skjóta og greiða kunning um, hvar á bíðilistanum barnið er. Soleiðis kunnu vit fyrireika okkum til tað, ið kemur. Tíverri er støðan ikki heilt tann sama í eldrarøktini.

Skipanin á eldraøkinum í dag tykist fløkt og ov nógvir leikarar eru á vøllinum. Útvarpsmaðurin fríggjadagin kallaði tað ein vavgreyt – eg velji at siga, at viðurskiftini eru nakað ógreið. Men hetta verður nú broytt.

**Samskipaði eldrarøktarøki**

Saman við Almannamálaráðnum eri eg farin undir eina tilgongd, sum hevur sum endamál at samskipa eldrarøktina. Ávegis eru tvær kunngerðir, sum áseta, at frameftir skulu røktarheim, sambýlir og heimarøkt samskipast í eldrarøktarøki kring landið. Hvørt eldrarøktarøki verður skipað undir einari leiðslu við felags visitatión og einari upptøkunevnd - heldur enn einari upptøkunevnd fyri hvørt heimið.

Yvirskipað tryggjar hetta, at skipanin verður einføld og gjøgnumskygd. Fyri okkara eldru merkir hetta, at tað verður ein og sama hurð inn í eldrarøktina.

Og fyri at venda aftur til atfinningarnar frá Jenis. Hesar broytingar fara at hava við sær, at hvørt øki fer at hava eina og somu skráseting og ikki sum nú, fleiri ymiskar. Tá verður møguligt at gera greiðar og eftirfarandi bíðilistar til tey eldru, ið hava tørv á tænastu ella røkt frá tí almenna. Tað er virðilig tænasta.

**Mennandi samskipan**

Ein samskipan fer eftir ætlan eisini at virka mennandi og tryggja, at játtan, starvsfólkaorka og tænastutilboð verða gagnnýtt til fulnar. Men skulu vit fáa fulla úrtøku úr hesum broytingum, er bráðneyðugt at fáa nøktað tann ovurstóra tørvin á røktarheimsplássum, sum er í løtuni. Tí er at fegnast um, at land og kommunur í felag eru farin undir at byggja íalt 136 búpláss til røktarkrevjandi eldri.

**Aðrar broytingar ávegis**

Sum liður í einari ætlan at javnseta búfólk á røktarheimum og sambýlum skulu pensjónistar, ið búgva á røktarheimum frameftir hava fulla pensjón á sama støði sum aðrir pensjónistar. Í dag fáa hesir eina niðursetta pensjón og aftur fyri rindar røktarheimið fleiri útreiðslur og tænastur fyri tey.

Broytingin verður eitt virðiligt frambrot fyri tey eldru á røktarheimum. Sjálvandi eiga tey at varðveita sína inntøku og so rinda tey sjálvi fyri tær tænastur, ið tey hava tørv á.

Eldraøkið í síni heild ber brá av ógreiðum regluverki og torskildum ábyrgdarbýti. Hetta er neyvt viðgjørt í Kommunuálitinum frá oktober í fjør, og er ein av stóru forðingunum fyri, at eldrarøktin kann leggjast til kommunurnar at umsita.

Tí er fyrsta stig hjá mær, at fáa greitt hesar fløkjur, at fáa skipað eldrarøktina skynsamt og trygt í nakrar sterkar eindir, so økið verður búgvið at lata kommunum at umsita og menna.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Ert tú góður við tíni húsdjór?
So er SKYTTENS hunda- og kettufóður rætta valið

**SPECIAL (20 kg)**
Turrfóður til vaksnar hundar við vanligum tørvi. Serlig oljublanding við týdningarmiklu omega-3 og omega-6 feittsýrunum gevur ein blankan og skínandi pels og syrgir fyri at pelsurin ikki gerst turrur. Er tískil eisini sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum. SPECIAL er eisini sera gott fóður til eldri hundar.
**Fyri posan...... kr. 450,-**

**SØCLA (20 kg)**
Turrfóður til hvølpar, unghundar og tíkir, ið geva mjólk. Inniheldur serliga oljublanding við týdningarmiklu omega-3 og omega-6 feittsýrunum, ið gev ein blankan og skínandi pels. Er tískil sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum. SØCLA er eisini gott til aktivar hundar. SØCLA inniheldur C-vitamin.
**Fyri posan...... kr. 540,-**

**SKYTTENs KAT (15 kg)**
Turrfóður til kettur við nógvum proteinum frá fiski, flogfenaði og eggum. Inniheldur úrdráttir úr hønsarungalivur, ið m.a. stimbrar smakkin. Lága PH-virðið fyribyrgir urinsteini (struvitkrystallum). Inniheldur TAURIN, ið er ein aminosýra, ið hevur týdning fyri nethinnuna, hjartamuskulaturin og immunverjuna.
**Fyri posan...... kr. 390,-**



SKYTTENS hunda- og kettufóður er hágóðskufóður, framleitt í Danmark. Fóðurið inniheldur ikki konserveringsevni, litevni, aromaevni ella sojaprotein.

**Bíleggjast kann við at senda t-post til kho@olivant.fo ella við at ringja á tel. 22 12 40. Ókeypis útkoyring í Tórshavn**